Ítróttar
Sosialurin
Nr. 73 • mikudagur • 12. apríl 2006 • 80. árgangur • www.sosialurin.fo

# Oddabrak í Gundadali




**B36 hevur fulla úrtøku, nú teir fyri fyrstu ferð fara at spæla heimadyst hetta kappingarárið**

B36-KÍ

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

B36 hevur staðið seg væl í fyrstu umførunum av Formuladeildini. Liðið hevur spælt tvær ferðir á útivølli og hevur vunnið báðar dystirnar.

Nú skal B36 spæla heima í Gundadali fyrstu ferð í ár, ogg teir ætla so avgjørt ikki, at støðan skal vera nakað verri eftir dystin skírisdag, skilst. Til endamálið hevur venjarin, Sigfríður Clementsen, allar sínar menn tøkar.

Tað hevur Tony Paris ikki hjá klaksvíkingunum. Paul Clapson fekk reytt kort, tá KÍ spældi móti Skála seinasta vikuskifti, og tí er hann leikbannaður. Hartil hevur í vikuni verið ivamál um Hjalgrím Elttør og Ova Nysted, sum hava havt smærri snuddir at dragast við, men teir sigast báðir vera til reiðar at halda fast um góðu gongdina, sum higartil hevur tryggjað KÍ fýra stig í tveimum truplum dystum.

# Grannar fullmannaðir til páskabrak

**Toftamenn og runavíkingar hava allar sínar spælarar tøkar til lokaluppgerðina í Runavík skírisdag**

NSÍ-B68

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Skírsdag verður lokaluppgerð í Runavík. B68 kemur at vitja NSÍ, og bæði liðini eru svong eftir stigum.

NSÍ hevur vunnið ein og tapt ein dyst higartil, og liðið skal helst vinna sínar dystir á heimavølli, um ætlanin um at verða við í toppstríðnum skal gerast til álvara.

B68 hevur bert fingið eitt stig higartil, og fyri toftamenn, sum spældu í næstbestu deildini í fjør, snýr tað seg fyrst og fremst um at fóta sær í bestu deildini aftur.

B68 hevur havt nógvar skaðar fyrr í ár, men nú eru teir flestu tøkir aftur. Allir, sum spældu í javnleikinum ímóti GÍ seinast, eru tøkir aftur, og harafturat er Øssur Jacobsen, sum lá sjúkur, aftur á fótum.

NSÍ hevur eisini allar sínar spælarar tøkar. Jústinus Hansen hevur verið skaddur í nakrar vikur, og hann er ikki klárur at spæla aftur enn.

## KÍ-høllin nýggjan leiðara

Nevndin fyri p/f KÍ-høllina hevur sett nýggjan leiðara fyri ítróttarhøllina í Klaksvík. Norðlýsið skrivar, at Kristoffur Ragnarsson er settur í starvið frá 1. mai at rokna. Í næstan 30 ár hevur Hjørleif Ellingsgaard røkt starvið, men hann er nú komin í eftirlønaraldur. Kristoffur hevur í nógv ár verið spælari og leiðari í Stjørnuni, og seinnu árini hevur hann virkað sum formaður í hondbóltsdeildini hjá Klaksvíkar Ítróttarfelag.

## Start manglar krút í álopinum

Venjarin hjá norska felagnum Start vil hava ein nýggjan álopsspælara til felagið, tí liðið hjá honum er við at koma í uppsetur við álopsspælarum.

– Vit hava verið óvanliga óhepnir við skaðum hjá álopsspælarum, og tí mugu vit hugsa um at fáa ein nýggjan álopsspælara til liðið, sigur Tom Nordlie við Fedrelandsvennen.

Todi Jónsson er ein av álopsspælarunum í Start, men hann hevur verið illa plágaður av skaða í hælsinuni seinastu vikurnar, og harafturat eru Stefan Barlin, Ben Wright og Jon Midttun Lie skaddir.

– Vit eru farnir frá 23 útispælarum til at hava 18 og ein hálvan spælara at ráða yvir, sigur Nordlie og sipar til, at Todi fær bara spælt ein hálvan tíma í hvørjum dysti í løtuni.